ETISKA RÁÐIÐ

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

11. februar 2022

## Hoyringarsvar frá Etiska ráðnum til: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur

Etiska ráðið hevur fingið til hoyringar "Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur – (endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku í sambandi við at barn doyr, stuðul til sjúkuútreiðslur og javning)". Etiska ráðið hevur hesar viðmerkingar:

Etiska ráðið tekur undir við og fegnast um, at foreldur, sum missa eitt barn, ella sum fáa eitt barn, ið er deyðføtt, nú fáa rætt til endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku í tíðini eftir andlátið ella tíðini eftir, at barnið er føtt. Við hesi broyting verður tað ikki longur neyðugt hjá annars frískum fólkum at skula fáa til vega sjúkraváttan frá lækna fyri ikki at missa arbeiðsinntøku, tá ólukkan rakar.

Etiska ráðið heldur eisini, at tað er umráðandi, at upphæddin, sum foreldur hava rætt til, er so mikið høg, at tað veruliga merkir, at tey ikki missa arbeiðsinntøku. Upphæddin eigur at verða javnað, so at hon altíð fylgir lønarlagnum í samfelagnum, og fyri ikki at gera mismun, eigur endurgjald til aðrar bólkar av borgarum, sum fáa veitingar eftir somu grein, eisini at verða javnað samsvarandi.

Vegna Etiska ráðið

Anne Mette Greve Klemensen, forkvinna